## Vanligt at halda innbúgv og KT uttanfyri

Formaðurin í Mentanarnevndini, Bill Justinussen, tekur ikki atfinningarnar frá samgongu og andstøðu til eftirtektar, eftir at málið um nýggjan miðnámsskúla var til 1.viðgerðar í løgtinginum hósdagin. - Tað er ikki óvanligt at halda KT og slíkt burtur frá tílíkum verkætlanum. Tað verða minst fimm ár, til vit skulu taka støðu til, hvørjar íløgur skulu gerast í KT og innbúgv. So talan verður ikki um eina umsókn um eykajáttan, men um eina játtan, segði Bill Justinussen, við Rás 2 fríggjadagin. Hann vísti á, at hetta er vanlig mannagongd í slíkum førum, av tí at tøkniliga menningin er so skjót, at tað ber ikki til at siga longu nú, hvussu stórar upphæddir talan verður um til ta tíð.



## Hægri løn fastheldur starvsfólki

Seinastu árini er tað vanligari og vanligari at arbeiðsgevarar bjóða starvsfólki aðrar ágóðar enn løn, men hetta er burturspilt. Hægri løn og fakligar avbjóðingar er tað sum telur, tá ið starvsfólk avgerða, um tey skulu skifta arbeiði ella ikki, vísa kanningar í Danmark hjá Ugebrevet A4, skrivar Samtak. Arbeiðsmarknaðargranskarar greiða frá, at kjakið um løn fyllur nógv í almenna rúminum. Eisini verður víst á, at í Danmark er tað eydnaðst fakfeløgum at fáa munandi betri arbeiðsumhvørvi, førleikamenning og eftirløn inn í sáttmálarnar, og tí fyllir hetta ikki so nógv í tilvitskuni hjá starvsfólki í dag í mun til fyri 5 -10 árum síðani, skrivar Samtak.

# Ólagaligir veruleikar

**- Úrslitini, sum liggja eftir Boga Hansen, Elias Davidsen, sála, starvsfólki á Fiskirannsóknarstovuni og starvsfólki aðrastaðni, hava ikki einans granskingarvirði, men eru eisini eitt av heilt fáum framtøkum, sum á føroyskum grundvølli hava møguleika at vera støði undir nýggjum vinnuligum átøkum. Um illa vil til, skal ikki meira enn ein óheppin avgerð á hægsta stigi til fyri at hesir møguleikar gleppa okkum av hondum skrivar Signar Heinesen í vinnukronikkini í dag. Greinin stóð í Sosialinum 14. nov. 2006**



VINNUSÍÐU-KRONIKKIN

*Signar P. Heinessen*

Øðrumegin standa teir negativu fundamentalistarnir: Einki ber til; Einki er møguligt; Alt er svart og neyð og elendigheit verður málað á veggin. Hinumegin standa teir positivu fundamentalistarnir: Veruleikin verður orðaður uppá kvamsvís alt eftir, hvat er lagaligast til løtuna: Andsøgnir, tvætl og veruleikar sleingjast hvørt um annað. Men veruleikin sjálvur rakar okkum, hvørt vit meina tað eina ella hitt. Fólk flest royna tí sum frægast at liva við teim óvissum og tí váða, sum hetta foldarlívið nú einaferð hevur at bjóða – og fólk flest hava eitt ynski um at geva sítt íkast til skynsama atferð.

Tí er tað trupult at yvirmeta týdningin av sakligari vitan. Slík saklig vitan verður bygd upp ígjøgnum mánaðar, ár, áratíggju, øldir og ártúsund. Tær mentanir, sum við makt hildu vitanini niðri, máttu lúta, og aðrar mentanir sluppu at royna seg. Tey lond, sum við makt forðaðu sakligum orðadrátti um tilverunnar margfeldi, taptu vælferð og land mótvegis teimum londum, har saklig vitan var sádd og røktað við skynsemi.

Í Føroyum hava vit í løtuni tvey mál, sum vit ikki hava ráð til at handfara uppá kvamsvís. Heilt einfalt tí tey hava ov stóran týdning í mun til okkara tilverugrundarlag. Annað málið er føroyska vinnuliga tilverugrundarlagið. Hitt málið hava vit í felag við restina av heimsins borgarum, og er tað umhvørvi og orka. Í hesi grein verður spurningurin um umhvørvið viðgjørdur. Hetta við grundarlagi í tveimum aktuellum hendingum: Onnur er tann, at Al Gore hevur gjørt ein film viðvíkjandi veðurlagsbroytinum (“An inconvenient truth”) og hin er, at Bogi Hansen er tilnevndur professari og hevur fingið norðurlendska virðisløn fyri náttúru og umhvørvi.

### Al Gore og filmurin “Ein ólagaligur sannleiki”

Al Gore er forsetavalevnið, sum í 2000 fekk hálva millión fleiri atkvøður enn George W. Bush, men sum mátti lúta í eini løgnari – og helst søguligari – uppteljingargølu í USA. Árini 1993-2000 var hann varaforseti í Bill Clinton stjórnini.

Miðjan sekstiárini las Al Gore stjórnmálafrøði á Harvard og hoyrdi har Roger Revelle, professara, røða um CO2 innihaldið í atmosferuni. Tað var Roger Revelle, professari, sum skundaði undir hesar mátingar, sum vóru settar í verk í 1958 og sum Charles David Keeling varð settur at taka sær av. Mátingarnar vóru gjørdar yvir Hawaii.

Roger Revelle framsetti í fimmtiárunum eina hypotesu um, at mannaættin við øktum fólkatali og øktari orkunýtslu vildi ávirka CO2 innihaldið í atmosferuni og at hetta ávirkaði hitan – tað, vit í dag nevna “vakstrarhúsárinið”. Hann vísti eisini á, at tað er sannlíkt, at CO2 økist í hóvunum.

Hetta merkir í stuttum, at Al Gore hevur upplivað ein mann, sum sá ein veruleika fyri sær út frá teoretiskum metingum. Hesar metingar vóru – og verða - eftirkannaðar við mátingum og nú, hálva øld eftir, halda vit okkum síggja samanhangin.

Al Gore er ein av fremstu politikarum í heiminum – gjørdist næstan heimsins valdmiklasti maður. Við eini søgu á Harvard saman við Revelle professara í skjáttuni er tað ikki at undrast yvir, at hann brúkar sína politisku orku til at sannføra heimsins borgarar um, at vit eiga at taka umhvørvis árin mannaættarinnar í størsta álvara. Eftir Revelle professara, sum doyði í 1991, og Keeling, sum doyði í 2005, er Al Gore annað ættarlið, sum úr Harvard hevur brúkt týðandi part av síni orku til at geva sítt íkast til skynsama atferð okkara millum.

Ein av “perlunum” í filminum hjá Al Gore er, tá ið hann nevnir trupulleikan í sambandi við ozon-lagið. Tað ber mannaættini til at



*Ein av “perlunum” í filminum hjá Al Gore er, tá ið hann nevnir trupulleikan í sambandi við ozon-lagið. Tað ber mannaættini til at taka tøk í felag.*
*Fáur – fyri ikki at siga eingin – granskari innan umhvørvisøkið er ósamdur um, at CO2 innihaldið í atmosferuni hækkar.*

*Úr bókini hjá Al Gore*

